# Persónskapan og keipumyndir



**Í august skipar MáF fyri Uppfrískingarskeiði á Gjáargarði fyri tey, ið umhugsa at spæla sjónleik komandi leikár**

TÍÐINDASKRIV

Ert tú ein teirra, sum hevur spælt sjónleik fyrr – kanska nýliga, kanska fyri nógvum árum síðan?

Hevði ikki verið spennandi at farið undir at spælt aftur!?

Tú skalt ikki halda teg aftur - men fara á skeið hjá MáF norðri við Gjógv, har vit fara at fríska upp og/ella menna tíni sjónleikarevni.

## Kend ævintýr

Íslendski føroyavinurin Sigrún Valbergsdóttir, ið skilur og talar føroyskt mál, og sum nógvir áhugaleikarar munnu kenna, kemur úr Íslandi at undirvísa á skeiðinum.

Skeiðið byrjar fríggjakvøldið 24. august og endar sunnudagin 26. august kl. 14. Gist og etið verður á Gjáargarði.

Vit fara at arbeiða við tøkni leikarans, at halda fokus, í rytmu og í undirtýdningum. Sigrún ætlar sær at brúka leikin “Másan” hjá russiska rithøvundinum Antoni Tchekhov, umframt annan tekst eisini.

Á skeiðnum verður arbeitt við tveimum ymiskum mátum at siga søgu. Arbeitt verður við venjingum í persónskapan og í undirtýdningum. Kend ævintýr verða brúkt til at skapa persónar og at gera keipumyndir - og at siga søgu á óvæntaðan og spennandi hátt!

## Íslendskur undirvísari

Um Sigrúna Valbergsdóttir er at siga, at hon arbeiðir sum freelance leikstjóri og leiklistarpedagogur. Hon tók sjónleikaraprógv frá Þjóðleikhúsinum í Reykjavík í 1970, las leikhúsfrøði í Køln 1975-78 og var leikhússtjóri í Alþýðuleikhúsinum 1980-82. Hon hevur verið dagligur leiðari í Bandalagi íslendskra leikfélaga (BÍL) 1983-89. Harumframt hevur hon leikstjórnað fleiri enn 40 leikum, bæði yrkisleikum og áhugaleikum. Tríggjar sýningar hevur hon sett upp í Føroyum, “Framá” í 1989, “Óvitar” í 1994 og Piaf í 2006. Hon hevur verið lærari á Leiklistarskóla Íslands og í Leiklistarskóla Bandalags íslendskra leikfélaga. Hon var kunningarstjóri í Borgarleikhúsinum 2001-2005.

**Stað:** Gjáargarður

**Tíðarskeið:** Fríggjakvøldið 24. august kl. 18.00 til sunnudagin 26. august kl. 14

**Kostnaður:** 700 krónur. Íroknað er undirvísing, gisting og kostur

**Tekning:** Hjá MáF, 315624 ella maf@maf.fo í seinasta lagi týsdagin 1. mai 2007.


